# Nú er Kaupthing eisini banki

**Kaupthing virkar nú eisini sum banki í Føroyum, og stjórin væntar, at starvsfólkatalið verður tvífaldað eftir stuttari tíð**

FÍGGJARVIRKSEMI
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Herfyri gjørdi íslendski Kaupthing Bank av at stovna bankadeild í Føroyum, og um mánaðarskiftið november-desember góðkendi fíggjareftirlitið í Keypmannahavn umsóknina frá bankanum um at sleppa at reka bankavirksemi í Føroyum.

Stjórin í føroysku deildini av Kaupthing Bank, Peter Holm, sigur, at tað er ein fyrimunur, at bankin er deild av íslendska móðurbankanum, tí tað ger hann nógv sterkari. Sum deild av íslendska bankanum hevur tann føroyska deildin eginpeningin hjá móðurbankanum aftan fyri seg, og hann liggur í dag um 30 mia. krónur.


*Peter Holm*

Hóast nýggi bankin er deild av útlendskum banka, skal hann lúka allar ásetingar og treytir, sum fíggjareftirlitið setir bankum í danska ríkinum.

- Og bankin rindar skatt í Føroyum, sigur Peter Holm.

Hóast Kaupthing Bank ikki hevur virkað sum banki í Føroyum fyrr enn nú, hevur felagið veitt fleiri føroyskum vinnufyritøkum fígging til íløgur ígjøgnum íslendska móðurbankan. Hetta virksemið byrjaði fyri umleið einum ári síðani, og hesa tíðina hava føroyskar fyritøkur lænt millum 1,4 og 1,5 mia. krónur frá Kaupthing Bank. Millum tær stóru fyritøkurnar, sum hava fígging frá Kaupthing Bank, eru Faroe Seafood, SMS og Framherji, sum m. a. eigur Fagraberg og Vesturvón.

### Eisini til rakstur

Sum nakað nýtt fer Kaupthing Bank nú eisini at veita føroyskum vinnufyritøkum rakstrarfígging, og júst hetta er eitt týðandi stig fyri virksemið, sigur stjórin.

- Vit hava saknað at hava kontur í Føroyum, og kundin skal kenna, at hansara fígging er hiðani. Hetta hevur verið tað liðið í ketuni, sum vit hava saknað, men nú hava vit fingið samanum, sigur Peter Holm.

Spurdur, um nýggi bankin fer at leggja seg eftir at fíggja íløgur og rakstur hjá stórum fyritøkum ella ávísum vinnugreinum, sigur Peter Holm, at so er ikki.

- Halda vit kundan og hansara verkætlan vera spennandi, og koma vit til ta niðurstøðu, at verkætlanin er í lagi, eru vit hugaðir fyri at fara uppí, og vit hava einki minstamark í stødd ella nakra avmerking í vinnugreinum.

Sjálvur ivast stjórin í føroysku deildini hjá Kaupthing Bank ikki í, at tey fáa nóg mikið at gera. Í hvussu er væntar hann, at starvsfólkatalið, sum nú er 20, verður tvífaldað eftir stuttari tíð.


*Kaupthing fer nú eisini at veita føroyskum fyritøkum rakstrarfígging*


# Arbeiðsformaður

Í sambandi við eitt størri vegarbeiði í Tórshavn søkja vit eftir royndum arbeiðsformanni.
Arbeiðsformaðurin skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at leggja arbeiðið soleiðis til rættis, at sum mest fæst burtur úr arbeiðsmegini hjá fólki og maskinum.

Tann, ið vit leita eftir, er

- sjálvstøðugur
- royndur innan veg- og lendisarbeiði (jørð- og kloakk)
- nærlagdur við góðum yvirliti
- dugnaligur at arbeiða í toymi
- røkin

Arbeiðsformaðurin kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við byggileiðsluna.

Vit bjóða eitt gott og spennandi arbeiðsumhvørvi í einum starvi, sum er krevjandi og mennandi fyri tann rætta persónin. Lønina tosa vit um.

Send eina umsókn, merkt arbeiðsformaður, til J & K Petersen á adressuni niðanfyri í seinasta lagi mánadagin 8. januar 2007. Eru spurningar viðvíkjandi starvinum skulu teir stílast til Steinolv Petersen, tel 585001..
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

J & K Petersen er eitt av eldstu entreprenørvirkjunum í landinum. Tey umleið 70 starvsfólkini, sum eru úr øllum fakbólkum, loysa allar anleggs- og byggiuppgávur.

J&K

SISERO 35180

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo